# SPARIPERUR til tín og mín

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

**TÆNK** mælir FRÁ at keypa spariperur av merkjunum Bright og Pro-Light.

**Danska brúkarablaðið Tænk hevur kannað 42 ymsar spariperur. Bert 6 perur stóðu royndina og verða mettar liva upp til støðið á vanligum gløðiperum. So tað er umráðandi at vera úti um seg, tá spariperurnar skulu í hús.**

## HESAR KOMU GJØGNUM NÁLAREYGAÐ:




Megaman GSU111d, Dimmerable 11 W kann setast í staðin fyri eina 40 W gløðiperu, inni og úti. Sigst at kunna brúkast saman við ljósdempara. Tolir ikki frost. Kúluskap.

**Meting: 60%**




Philips Tornado Turbo ESaver 20 W kann setast í staðin fyri 75 W gløðiperu innandura. Snyrilsskap.

**Meting: 67%**




Megaman LILIPUT, SLU114 14 W kann setast í staðin fyri eina 40 W gløðiperu, uttandura. Eisini í frosti.

**Meting: 58%**




Philips Tornado Turbo ESaver 15 W kann setast í staðin fyri 60 W gløðiperu innandura. Snyrilsskap.

**Meting: 66%**




OSRAM DULUXSTAR MINI Twist 11 W kann setast í staðin fyri 40 W gløðiperu innandura. Snyrilsskap.

**Meting: 67%**




OSRAM DULUX EL LONGLIFE 15 W kann setast í staðin fyri eina 40 W gløðiperu, inni og úti. Tolir ikki frost. Stavformað.

**Meting: 61%**

## Visti tú?

Ein 15W sparipera svarar til eina 60W gløðiperu.

**Royn** peruna í handlinum.

Bíða í nakrar minuttir, til peran er **hitna** og lýsir við fullari megi.

## Hav í huga, tá tú keypir spariperur

- Hvussu sterka peru hevur tú brúk fyri?
- Skal ljóstónin vera sum dagsljós, heitt gult ljós ella annan lit?
- Testa litin á ljósinum áðrenn tú keypir, um tað ber til
- Skal peran brúkast inni ella úti?
- Skal hon hava peruskap, stavskap ella sum ein snyril – tær eru allar líka góðar.